# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Nútímans universitet

Í undanfarnu samgonguni varð ásannað, at tørvur varð á endurskoðan av okkara hægru útbúgvingarstovnum. Í Europa vóru framdar stórar broytingar innan universitetsheimin og nógv gamlir múrar fullu eins og nógv gomul akademisk halgineyt vóru avsøgd. Ferð varð sett á at samskipa tilgongdina at nútímansgera universitet og hægri lærustovnar. Henda tilgongd nevnist Bolognatilgongdin, og kunnu øll lond, ið ynskja tað gerast partur av hesi skipan. Skipanin er ein fortreyt fyri at hægri lærustovnar í Europa kunnu samstarva uttan mun til limaskap í ES ella ikki.
Tá val varð útskrivað, lá longu frálíkt uppskot til nýggja lóg um Fróðskaparsetur á tingborði. Hetta uppskot varð evnað til av fakligum arbeiðsbólki, ið táverandi landsstýrismaður, Jógvan á Lakjuni, hevði sett. Uppskotið fekk undirtøku frá einum samdum løgtingi, men varð tó ikki framt orsakað av valinum. Uppskotið varð sett framaftur mestsum óbroytt, og í síðstu viku samtykti Løgtingið nýggju lógina um Fróðskaparsetur Føroya, ið nú eisini fevnir um Føroya Læraraskúla og Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya. Harvið gerst Fróðskaparsetrið munandi størri, og fara munandi fleiri hægri útbúgvingar at verða bodnar út í Føroyum. Í síni fráboðan skrivar Mentamálaráðið, at Fróðskaparsetur Føroya fer væntandi at vaksa komandi árini, so hvørt sum útboðið av útbúgvingum verður størri, og tá útbúgvingar væntandi verða bodnar út á hvørjum ári í framtíðini. Eisini er ætlanin, at útbúgvingar á Vinnuháskúlanum og partar av útbúgvingunum á Handilsskúlanum, gerast hægri útbúgvingar og partar av Setrinum. Hetta seinasta er nýtt og áhugavert, og er gott boð uppá, hvussu hesir báðir stovnar skulu menna seg til tær nýggju avbjóðingar, ið fylgja av globaliseringini.

Við nýggju lógini verður Fróðskaparsetrið til eitt nútímans universitet. Rættvíst ella órættvíst, so hevur Setrið av einum breiðum almenningi verið mett sum ein akademiskur støðuhylur, eitt lokað og avbyrgt samfelag í samfelagnum. Hóast tekin seinastu árini hava verið um, at stovnurin var við at lata seg upp fyri umheiminum, hevur myndin av einum ávísum trekleika verið standandi. Stovnurin var so ikki tað lokomotiv, sum universitetini í grannalondunum og úti í Europa eru. Hetta hevði ivaleyst sínar orsøkir, sum ikki bert vóru at finna á stovninum, men í eins stóran mun hjá avvarandi myndugleikum. Men nú er so gongd komin á nútímansgerðina, løgting og landsstýri tykjast sinnað at játta stovninum tað fæfeingi, sum skal til fyri at menna stovnin, og tað boðar frá góðum. Nú ræður um, at raðfesta útbúgvingar og gransking við skili. Nýggj viðkomandi útbúgvingartilboð eru á veg, tað er sera gott, men vit kunnu ikki dylja, at vit eru vónbrotin um, at ein føroysk fjølmiðlaútbúgving ikki er ímillum hesar. Vónandi verður hetta veruleiki um ikki alt ov langa tíð.

**Sosialurin**

## Skerd barnatænasta fær vanlukkuligar avleiðingar

RÓSA SAMUELSEN



**Skal Barnatænastan skerjast við 1,2 mió. kann tað fáa vanlukkuligar avleiðingar. Tænastan hevur, sum er, ov lítið av peningi at røkja álagdar skyldur. Ført verður fram í fjølmilunum at Barnatænastan er hótt, og uppsagnir eru á veg**

Tað, sum verri er, er at tað eisini fer at hava vanlukkuliga avleiðingar av tí, at vitjanirnar í heimum við smábørnum fara at fække og kanska í ringasta føri detta burtur.

70% av øllum barnaverndarmálum verða fráboðaðar av barnatænastuni, og eru tað mál sum umsorganarsvíkur í sambandi rúsdrekkamisnýtslu, væntandi foreldraførleiki ella siðamisnýtsla, bert fyri at nevna nøkur dømi.

Barnatænastan hevur fyri fyrstu ferð nakrantíð megna at sett heilsufrøðingar í øll økir í landinum, sjálvt um tað als ikki er nøktandi. Í fleiri økjum er enn bert talan um hálv størv í barna ella skúlaøkjum.

Tað eru 19.5 ársverk til 7700 skúlabørn (60 skúlar) pluss 5000 børn undir skúlaaldri, og enn eru tað bert børn frá 0 til 1 1/2 ár sum fáa heimavitjan av heilsufrøðingi, og síggja tey so ikki heilsufrøðingin aftur fyrr enn farið er í skúla. Børn á dagstovni ella dagrøkt fáa ikki hesa tænastu, uttan so at starvsfólk sum starvast við børnum kunnu fáa ráðgeving.

Tað er trupult at fáa sett heilsufrøðingar, tí tað eru fá starvsfólk við hesi serútbúgving í Føroyum og als ikki nøktandi játtan.

Tað er sera umráðandi, at Barnatænastan fær sett 2 størv um árið til tænastan er nøktandi, soleiðis at allar, bæði "skal og kann" uppgávurnar, verða røktar, sambært lóg og kunngerð, sum varð sett í gildi í november 2007, og ikki minst at fáa gjørt hagtøl fyri heilsustøðuna hjá børnum og ungum. At seta lógir og kunngerðir í gildi og ikki hava starvsfólk hongur ikki saman.

Vera nú økir uttan tænastu, meti eg at tað er rættuliga álvarsamt.

Barnatænastan hevur fingið nýggjar "**skal**" uppgávur á skúlunum.

*Hetta er:*

At ráðgeva lærarum og øðrum fakfólkum viðv. børnum við serligum tørvi

At hava eftirlit viðv. heilsu- og trivnaðarumstøðum á skúlunum

At hava eftirlit viðv. reinføri á skúlunum

At samskipað/samstarva við kommunulæknarnar, ið koma at møta skúlabørnunum í egnum kommunulæknahøli

At umsita tað samskipandi liðið millum Barnatænastu og lækna, fyrr skúlalækna. Hetta er m.a. kunning millum Barnatænastu og kommunulækna (er ásett í kunngerð, m.a viðv. at gera 3 faldarar)

Somuleiðis hevur Barnatænastan fingið nýggjar uppgávur at veita stovnum, sum veita tænastu til børn og familjur.

Hetta eru "**kann**" uppgávur, men av tí at hetta eru tænastur, ið heilsufrøðingar veita stovnum í t.d. Danmark og øðrum Norðanlondum, hava bæði fakfólk og foreldur væntanir til, at hendan tænasta verður veitt av heilsufrøðingunum.

Førleikin er, men fíggjarliga tilfeingið vantar.

Um Barnatænastan ikki kann veita fakfólkum, stovnum og skúlum hesa tænastu, hvar skulu tey so fáa hesa tænastu frá?

*Tænastan til stovnar er tildømis:*

Ráðgeving til starvsfólk viðv. børnum við serligum tørvi

Ráðgeving viðv. heilsu og trivnaði

Ráðgeving og eftirlit viðv. reinføri

Eftirlit viðv. heilsu og trivnaði

Við nýggju lógini og kunngerðini verða nógvar nýggjar tænastur kravdar. Barnatænastan kann ikki virka smbr. nýggju lógini, um verandi starvsfólkatal ikki verður økt. Ei heldur ber til at seta nýggju skúlalæknaskipanina í verk, um Barnatænastan ikki fær meiri tilfeingi.

## So seriøst verður arbeitt

FINNUR HELMSDAL



Nú álitið til fíggjarlógaruppskotið kom aftur úr fíggjarnevndini, hevði minnilutin ikki færri enn trý ymisk álit. Tað mest rúgvismikla var frá umboði Fólkafloksins, Anfinni Kallsberg. Anfinn hevði uppskot um at lækka ella hækka eina rúgvu av konti, og haldið tykkum fast, tær flestu á almanna og heilsuøkinum. Veit ikki, hvørjum leisti Anfinn hevur arbeitt eftir, men eitt av uppskotunum var at lække játtanina til Barnatænastuna (fyrr heilsusystrarnar) við 1,2 milliónum. Nú veit eg heldur ikki, hvussu Edvard í Skorini Joensen á Vikublaðnum hevur lisið fíggjarlógaruppskotið, men hann ringir til leiðaran fyri Barnatænastuna, sum er á fundi. Edvard spyr stutt og greitt leiðaran, hvussu nógv størv 1,2 millión er í hennara høpi. Hon svarar trý. Síðan biðjur Edvard farvæl. Hann setir seg so at skriva eina grein um, at nú vil løgtingið taka trý størv frá Barnatænastuni. Sambandsmenn teljast millum teirra, sum nærlesa Vikublaðið. Teir lesa tí eisini greinina hjá Edvardi, og eru skjótir at seta fram broytingaruppskot við triðju viðgerð um, at játtanin til Barnatænastuna verður hækkað aftur við 1,2 milliónum. Uppskotið fellur sjálvsagt, tí eingin uttan Anfinn Kallsberg hevur nakran tíð ætlað at lække játtanina til Barnatænastuna.

Teir í Útvarpinum hava kanska ikki so nógv spennandi tíðindi at bera mánamorgunin eftir. Og so síggja teir, at løgtingið ikki vil hække játtanina aftur til Barnatænastuna, og at løgtingið tí vil taka trý størv frá framman undan niðurpínda stovninum. Og so er tað ein søga mánamorgunin í Útvarpinum.

Nú stóðu løgtingsfólk á herðunum á hvørjum øðrum til tess at sleppa framm at at spilla samgonguna út og kalla hana óseriøsa. Hetta tá 2.og 3. viðgerð av fíggjarlógaruppskotinum fór fram hósdagin og fríggjadagin. Haldi, at menn áttu at sópa fyri egnum hurðum allarfyrst. Men kanska eigur Edvard at krevja eitt hvørt fyri copyright.

Annars gott summar øll tit seriøsu.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.